VÓNIN®

Vónin Ltd.
Bakkavegur 22 · P. O. Box 19
FO-530 Fuglafjørður
Faroe Islands

Tel +298 474 200
Fax +298 474 201
info@vonin.com
www.vonin.com

Fiskivinnuroyndir
Att.: Jákup Mørkøre, samskipari
Postboks 347
Heykavegur 6
FO-110 Tórshavn

Fuglafjørður, tann 01.februar 2010

**Viðvíkjandi verkætlanini "Svartkjaftarist", J.NR.: 200700670.**

Fyrst av øllum vilja vit biðja tykkum halda okkum tilgóðar, at verkætlanin "Svartkjaftarist" J.NR.: 200700670 hevur drigið út.

Nú er verkætlanin loksins liðug og senda vit tykkum tí fylgjandi:

- Endaliga frágreiðing
- Samandrátt til heimasíðuna
- Grannskoðaðan roknskap
- Umbøn um útgjald

Um okkurt er ógreitt, so hoyra vit frá tykkum.

Vit vilja nýta høvið at takka fyri sera gott samstarv.

Vinaligar heilsanir

**P/F Vónin**

Jógvan S. Jacobsen
verkætlanarleiðari

FISKIMÁLARÁÐIÐ

11. FEB. 2010

J. NR. 200700670 - 14/2501

Reg No.P/F 136 · VAT No 324.752

Tórshavn Branch:
Vónin Ltd.
Viðarnes
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel +298 35 43 91
Fax +298 31 33 19

Qalut Vónin A/S
Aqqusinersuaq B 2815
P. O. Box 779
3900 Nuuk
Greenland
Tel +299 32 32 31
Fax +299 32 57 58

Vónin Canada Ltd.
P. O. Box 100
Port-de-Grave
Newfoundland
Canada A0A 3J0
Tel +1 709 786 4673
Fax +1 709 786 4674

Skipshandilin P/F
Havnargøta
P. O. Box 115
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
Tel +298 31 23 30
Fax +298 31 04 98

# Endalig frágreiðing um verkætlan nr. 200700670

Vit vilja her greiða frá tilgongdini í eini verkætlan, ið hevur til endamáls at menna eina skiljirist til svartkjaft. Tað sum í høvuðsheitum skal skiljast frá svartkjaftinum, er upsi og toskur, ið ofta svimur í stórum mongdum saman við svartkjaftinum.

Menningin av skiljiristum til svartkjaft hevur í stóran mun verið at gera sjálva ristina smidliga, soleiðis at hon kann koyrast uppá netatrumluna saman við trolinum og samstundis varðveita styrkina. Skiljingin av fiskinum hevur verið nøktandi, so tað hevur ikki verið neyðugt at gera stórvegis broytingar við tann partin.

Felags fyri øll uppsjóvarskipini er, at tey hava stórar netatrumlur at koyra trolini uppá, tað vil siga, at ristin kemur at liggja í einum boga uppi á trumluni, ofta undir nógvum trýsti.



*(Stálrist í 3 stykkjum)*

Um ristin hevði verið gjørd í einum stykki, hevði hon verið 3,6 metrar høg, og tað hevði verið sera trupult at fingið hana inn og út uttan at hon hevði verið løstað, og hon hevði ikki kunnað verið koyrd upp á trumluna.

Tær fyrstu ristirnar ið vórðu royndar, vórðu gjørdar úr rustfríum stáli. Valt varð at gera hana í trimum stykkjum soleiðis, at tá hon fór uppá trumluna, skuldi hon hava tveir liðir á sum gjørdu, at hon fylgdi boganum á trumluni. Royndirnar við hesi ristini vórðu gjørdar umborð á "Christian í Grótinum". At gera hana í trimum stykkjum riggaði nøkunlunda, men við tíðini vísti tað seg, at ristirnar boygnaðu rættiliga illa, og kundu í roynd og veru ikki brúkast sum ein varðandi loysn.

.



*(Flexi-Grid)*

Síðani varð roynt at gera ristina úr plasti – og í trimum stykkjum við stálristini sum fyrimynd. Hetta tilfar var seigt og hildið varð, at tá tað boygnaði kom tað upp á pláss aftur. Men ristin og teinarnir máttu gerast sverari, tí plastið var ikki so sterkt sum stálið. Hetta førdi við sær, at gjøgnumstreymurin bleiv munandi verri, og tað ávirkaði skiljingina tann skeiva vegin, so hetta var eingin góð loysn

Nú varð søkt um stuðul frá Fiskivinnuroyndum til at halda fram við menningini av ristini. Funnið varð fram til eina rist – eina Flexi-Grid – ið er gjørd úr rørum, sum bara eru 30 cm til longdar og har sokallaður Dyneema-tráður verður drigin ígjøgnum. Dyneema er sterkari enn stál av somu tjúkt, og hevur eisini tann eginleika, at tað ikki toygnar. Av tí at rørini eru so stutt, verða nógv fleiri liðir á ristini. Ristin, sum verður framleidd í Hetlandi, er so at siga bara roynd innan alivinnuna, har hon verður brúkt til at støddarskilja laks og annan alifisk.



*(Flexi-Grid)*

Saman við einum umboði frá Havstovuni fór eitt umboð frá Vónini til Hetlands at vitja framleiðaran av ristini. Hann var blíður og týður, og hevði eisini stóran áhuga fyri at fáa hana roynda í troli. Maðurin, ið hevur uppfunnið ristina var stjóri á fyritøkuni, og hann var eisini fyrrverandi skipari á stórum uppsjóvarskipi. Hetta gjørdi tað nógv lættari at greiða honum frá, hvat vit ætlaðu at nýta ristina hjá honum til. Hann var ikki í iva um, at ristin var nóg sterk til endamálið, og nevndi eisini ymiskar møguleikar at tillaga ristina til júst okkara brúk.

Henda ristin vísti seg at vera sera vælegnað til at koyra uppá trumluna saman við trolinum. Ein trupulleiki var tó, at ristin var fýrakantað, men netið sum hon var monterað í, er sum eitt runt rør undir troling. Hetta gjørdi, at ristin fall saman og misti harvið skiljieginleikarnar. Eftir hetta varð so roynt at seta nakrar plast tvørstívarar á hana, fyri at hon skuldi varðveita skapið. Hetta eydnaðist eisini, men nú var ristin aftur vorðin eitt sindur ófantalig og rúgvusmikil, og tað kom eisini fyri, at stívararnir brotnaðu.



*(rundað Flexi-Grid)*

Síðan var avgjørt at royna at gera eina runda rist. Fyrimunurin við Flexi-Grid ristini er, at hon kann formast eftir ynski. Tað vil siga, at vit kundu taka rør burtur onkunstaðni, meðan tað bar til at knýta tey aftrat aðrastaðni. Sostatt bar til at gera ristina runda.



*(rund Flexi-Grid ísett)*

Ístaðin fyri at royna at spenna og stíva ristsektiónina av til at verða fýrakantað, so lótu vit hana vera runda. Nú var tað netið, ið spenti ristina út ístaðin fyri, at ristin og stívarar stríddust við at trýsta netið sundur. Eisini settu vit "segl" á síðurnar á ristini fyri at tryggja, at hon spentist nóg nógv sundur. Hesi segl verða vanliga verða sett á høvuðlínuna, fyri at fáa trolið at gapa meir.



*Trol við Flexi-grid ristini í (seglini síggjast uttaná)*

Royndirnar av ristini vórðu gjørdar umborð á Finni Fríða í 2009. Ein maður frá Vónini var umborð fyri at gera neyðugu tillagingar og kameraupptøkur v.m. Royndirnar livdu fult upp til endamálið við skiljiristini, og afturmeldingarnar frá skiparanum hava eisini verið sera góðar. Vit síggja tí royndirnar í 2009 sum tær, ið hava leitt okkum á mál hesum viðvíkjandi.

Vónin roynir allatíðina at fylgja við, hvat ið rørir seg innan menning av fiskireiðskapi. At menna trol o.a. hevur ofta stórar útreiðslur við sær, og tí kemur møguleikin at søkja um stuðul sera væl við. Vit vilja tí takka Fiskivinnuroyndum fyri fíggjarliga stuðulin av hesi verkætlan. Vit ynskja eisini at takka reiðaríum og manning hjá Christiani í Grótinum og Finni Fríða fyri at teir vildu lata okkum gera hesar royndir umborð á skipum teirra.

P/F VÓNIN

Jógvan S Jacobsen